## Gáva ella rættur

Í Danmark eru fólk farin at kjakast um, hvørt dópurin er ein gáva til hvønn einstakan ella ein mannarættur, sum hvør einstakur hevur. Orsøkin til kjakið er eitt rundskriv frá kirkjumálaráðnum, har tað stendur, at dópurin er ein mannarættur, sama hvørja tann einstaki hevur. Tað eru ikki øll, sum eru so fegin um hesa tulkingina, skrivar Kristeligt Dagblad. Summi halda, at dópurin er ein gáva frá Guði og ikki ein løgfrøðiligur mannarættur.

## Jógvan gevst

Fyrst ætlaði hann sær at halda fram sum formaður í Maskinmeistarafelagnum, men nú hevur Jógvan Nybo boðað frá, at hann stillar ikki uppaftur, tá felagið fer at hava aðalfund leygardagin. Avgerðin kom skrivliga seinasta fríggjadag, men sambært Útvarpinum vil Jógvan Nybo ikki siga, hví hann hevur broytt støðu. Limirnir í Maskinmeistarafelagnum hava kortini nóg mikið at velja í, tí tríggir limir hava boðað frá, at teir stilla upp.

# Sambandsflokkurin vil savna allar partarnar

**Áðrenn farið verður víðari við yvirtøkuni av fólkakirkjuni, ynskir Sambandsflokkurin at savna allar partarnar í málinum. – Samgonga, andstøða, politiski og kirkjuligi fylgibólkurin eiga at tosa saman, soleiðis at greiða fæst á, hvat man er nøgdur við og hvat man ikki er nøgdur við, heldur Kaj Leo Johannesen**



*Tey signalini, sum nú eru komin út, bera ikki boð um, at fólkakirkjan verður yvirtikin á ólavsøku í samráð við allar partar, sum tað stendur skrivað í samgonguskjalinum og tí ynskir Sambandsflokkurin at savna allar partarnar til fund*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

POLITIKKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Á middegi í gjár hevði samgongan fund, har yvirtøkan á fólkakirkjuni var umrødd. Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í Mentamálum var við á fundinum, og hann lýsir fundin sum góðan og positivan.

– Har komu ymisk sjónarmið fram, og Sambandsflokkurin ynskti at fáa nakrar spurningar útgreinaðar, greiðir Jógvan á Lakjuni frá, sum nú hevur avtalað fund við politiska fylgibólkin og kirkjuliga fylgibólkin, soleiðis at Sambandsflokkurin kann fáa svar upp á sínar spurningar.

### Keðilig signal útkomin

Men hvørjir eru spurningar, ið Sambandsflokkurin vil hava svaraðar? Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, greiðir soleiðis frá:

– Tey signalini, sum nú eru komin út, bera ikki boð um, at fólkakirkjan verður yvirtikin á ólavsøku í samráð við allar partar, sum tað stendur skrivað í samgonguskjalinum.

– Tí ynskja vit ein uppklárandi fund, har vit hava alt forumið (samgongu, andstøðu, politiska fylgibólkin og kirkjuliga fylgibólkin, blðm.) savnað og fáa greiði á, hvat tað er man er nøgdur við og hvat man ikki er nøgdur við, greiðir Kaj Leo Johannesen frá, sum ynskir at sláa fast, at Sambandsflokkurin ynskir at yvirtaka fólkakirkjuna.

Hetta skal tó gerast í semju og samráð vil allar partar, og tað er tað Sambandsflokkurin ynskir at fáa burtur úr fundinum ???, har allir partarnir eru savnaðir.

## Sjálvstýrisflokkurin ynskir yvirtøku á ólavsøku



– Vit hava drigið somu línu líka til nú, men vit eiga at halda fast við ólavsøku sum mál fyri yvirtøkuni, sigur Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum og limur í politiska fylgibólkinum, sum hevur fylgt yvirtøkuni av fólkakirkjuni.

Kári P. Højgaard heldur, at tey í fylgibólkinum hava havt eitt ógvuliga gott samstarv, men at nakrir snávingarsteinar eru nú móti endanum, slepst ikki undan heldur hann.

Kári P. Højgaard harmast um, at tað ikki eydnaðist at fáa kirkjuna yvirtikna í undanfarnu samgongu, men rósar samstundis landsstýrismanninum fyri at hava gjørt eitt gott arbeiði í hesum málinum.

Jógvan við Keldu:

# Ovasta politiska leiðslan skal vera limur í fólkakirkjuni

**Jógvan við Keldu, tinglimur fyri Fólkaflokkin, er fullkomiliga samdur við dómpróst, Bjarna Bæk, um, at ovasta politiska leiðslan, sum varðar av fólkakirkjuni, eigur at vera limur í fólkakirkjuni**



POLITIKKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í sendingini 62 Norður í Útvarpinum í gjár, segði dómpróstur Bjarni Bæk, at tað mátti vera eitt krav, at ovasti politiski leiðslan, sum varar av fólkakirkjuni, eigur at vera limur í henni eisini.

- Tann, sum hevur politisku ábyrgdina av einari yvirtiknari fólkakirkju, má eisini vera limur í fólkakirkjuni, tí annars syndrast kirkjan, segði Bjarni Bæk, dómpróstur.

Hetta er eitt sjónarmið, sum Jógvan við Keldu, tinglimur fyri Fólkaflokkin, er fullkomiliga samdur í.

– Eg eri púra samdur við dómpróst í, at ovasta politiska leiðslan eigur at vera limur í fólkakirkjuni. Tað er mín persónliga meining, sigur Jógvan við Keldu.

### Limur í kirkjuni og ateist?

– Men hvat nú, um tann landsstýrismaðurin ella løgmaður, sum hevur ábyrgd av kirkjuni og er limur í henni, brádliga sigur seg vera ateist, spyr Jógvan við Keldu?

Hann vísir á, at tað er bara limurin sjálvur, sum kann melda seg úr kirkjuni. Hesin kann saktans vera limur í kirkjuni, men samstundis siga vera ateist ella okkurt annað, og so hava vit ein trupulleika, heldur Jógvan við Keldu.

– Og hetta er ein trupulleiki, sum má greiðast áðrenn kirkjan verður yvirtikin, sigur hann.

### Sleppa undan stríði

Jógvan við Keldu sigur, at hann heldur at løgmaður átti at havt evstu politisku ábyrgdina fyri fólkakirkjuni. Men skal tað so vera eitt krav, at løgmaður meldar seg sum lim í kirkjuni, um hann ikki er tað frammanundan?

– Nei, tað skal tað ikki. Er tað soleiðis, at løgmaður ikki er limur í fólkakirkjuni, so verður ábyrgdin av kirkjuni latin landsstýrismanninum í Mentamálum, ella onkrum øðrum landsstýrismanni, sigur Jógvan við Keldu.

Við at politiski myndugleikin við ábyrgd av kirkjuni er limur í henni, slepst undan mongum ivamálum, tá stríðsmál stinga seg upp, metir Jógvan við Keldu.

– Tað vísir seg, at tað mesta í Føroyum endar í stríði, men við hesum slepst í hvussu so er undan stríðnum uttan um, heldur Jógvan við Keldu, ið sipar til, at tað er skjótt at seta spurnartekin við ovastu politisku leiðsluna, ið varar av fólkakirkjuni, um viðkomandi ikki er limur í henni eisini.